## OPEC ikki ábyrgdina av prísskelkinum

Tað er spekulatión og ikki manglandi oljuútboð, ið er orsøkin til teir methøgu oljuprísirnar. Næstseinasta vikuskiftið varð oljutoppfundur hildin í Saudi-Arabiska havnabýnum Jeddah. Umframt stjórnarleiðarar og ráðharrar úr 35 londum, luttóku umboð fyri 7 felagsskapir og 25 oljufeløg á fundinum. Við stuttari ávaring hevði Abdullah kongur í Saudi-Arabia bjóða viðkomandi pørtum at skifta orð um prísskelkin og møguleikarnar fyri at fáa oljuprísin at falla, og harvið blása nýtt lív í heimsbúskapin. Aftaná at hava fundast í fýra tímar, noyddust luttakararnir tó at fara heimaftur uttan úrslit. "Stúranirnar um framtíðar oljutilfeingið eru grundleggjandi skeivar. Heimurin hevur nokk av olju til nógv ártíggju afturat. Okkum tørvar ikki meira olju í undirgrundini, men harafturímóti at fáa oljuna upp, góðska hana og fáa hana út til brúkararnar. Við øðrum orðum kunnu hvørki høgu oljuprísirnir ella tey stóru sveiggini á oljumarknaðinum vera grunda á hesi viðurskifti," sigur Ali al-Naimi oljuráðharri í Saudi-Arabia. (industry.fo)



# Ein rummisk ætlar til túsund

**Hósdagin í farnu viku sást fyrsta teknið til eina ta størstu verkætlanina av slíkum slagi í Føroyum. Talan var um ein nýggjan skeiðsdepil í Skálavík, sum tað fer at taka eini tvey ár at byggja. – Við virksemi sínum á sjónum skapti Eiler Jacobsen sær tað ríkidømið, sum nú verður pløgt niður í tað jørðildið her í bygdini, og sum hann altíð hevur havt tokka til, sigur Linjohn Christiansen, borgarstjóri í Skálavíkar kommunu**

BYGDAMENNING

*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skálavík:** Tað var Eiler Jacobsen sjálvur sum loysti fyrsta bøkkin til henda depilin, ið fyrst og fremst skal vera karmur fyri kristiligum møtum og legum.

Ætlanin er síðan at depilin skal gerast til ein part av føroysku ferðavinnuni og øðrum virksemi, sum verður avleitt av hesum.

Tríatitals milliónir verða nú settar í henda frítíðar- og mentanardepilin, sum tað væntandi fer at ganga tvey ár at byggja. Depilin liggur á einum 50.000 fermetrar stórum grundøki ovarlaga í bygdini.

Borgarstjórin í Skálavík, Linjohn Christiansen fegnast – sum vera man – um hesa nýggju ætlanina í hansara kommunu. Eftir hansara meting verður her ein møguleiki at kunna hýsa størri altjóða ráðstevnum í Føroyum.

- Vónandi fara eisini útlendsk ferðalið og áhugabólkar at koma til Skálavíkar at halda skeið og størri ráðstevnur.

- Verður tað so, fer hetta uttan iva at skapa lív í hesi bygdini og í allari oynni, sigur Linjohn Christiansen.

### Víðskygd ætlan

Tað er so við og við liðin nøkur ár, síðani Linjohn Christiansen fekk eini heldur óvæntaði telefonboð.

Maðurin í hinum endanum var Eiler Jacobsen, fyrrverandi reiðari og sum hevði eittans mál á skránni:

- Kann eg keypa eini fýra samanhangandi grundøki uppá nógvar túsund fermetrar?

Hetta ljóðaði so ógvusligt, at borgarstjórin gjørdist fullkomuliga tikin á bóli, ikki minst, tá Eiler greiddi honum frá ætlan síni í Skálavík.

- Eg skilti beinanvegin, at her skuldi meiri ríviliga takast til, enn við eitt vanligt grundøki. Lendið undir eini slíkari byggiætlan mátti á ongan hátt verða ein forðan, sigur Linjohn Christiansen.

Eiler kom jú sjálvur at vaksa upp her í bygdini, og nú hakin er settur í ætlanina um skeiðsdepilin er hetta á einum staði, har børnini í Skálavík eiga mong góð minnini.

- Tað er helst so sum Linjohn Christiansen tekur til: - Staðið her Inni á grind hóskar væl til nakað so víðskygt sum henda ætlanin!

### Vitan og sálarmátt

Ætlanin hjá Eileri Jacobsen er at byggja ein umleið 4000 fermetrar stóran frítíðardepil, har møguleikar fyri alskyns virksemi skulu skapast.

Hesin depilin skal hava umstøður til ferðavinnu, fundir, skeið, ítriv og sjálvandi gisting. Ella sum Linjohn Christiansen tekur til:

- Her verða hallir til fundir, samkomur, svimjing og ítriv og leikvøllir til kropp, sinn og sál at hvíla, koma fyri seg og at savna megi og mátt!

Hann vísir á, at ætlanin hjá Eileri er ikki minst at depilin skal nýtast til kristiligar fundir, og tí verða ikki færri enn tvær samkomuhallir at finna í skeiðsdeplinum.

- Tað er mín vón, at fólk, bæði ung og gomul, ein-



*Tað fara væntandi at ganga eini tvey ár at byggja stóra skeiðsdepilin ovarlaga í Skálavík. Her verður einki spart og tí verða umstøðurnar eisini tær bestu hjá teimum vitjandi*



*- Tað hevur stóran týdning, at vit eiga ágrýtin fólk, sum haraftrat hava tey góðu hugskotini, tora at váða nakað og haraftrat eru stórtøkin og gávumild, segði Linjohn Christiansen, tá hakin varð settur í stóru ætlanina í farnu viku. Fremst á myndini Eiler Jacobsen, sum stendur aftanfyri verkætlanini við eini 30 mió krónum*